

## Cieslewicz á veg í superliguna

Lukasz Cieslewicz, sum áður hevur spælt í Føroyum, royndarvenur í hesum døgum í Lyngby. Ein gamal kenningur í føroyskum fótbólti er í hesum døgum á vektini, sum skal gera av, um hann er nóg tungur at taka lut í fremstu donsku fótbóltsdeildini. Talan er um Lukasz Cieslewicz, sum er sonur Robert Cieslewicz, ið spældi í 90-unum í bæði Fuglafirði og í Vági. Lukasz, sum er øgvuliga evnaríkur framrættaður miðvallari, hevur áður roynt seg í Brøndby, og seinastu tíðina hevur hann spælt við Hvidovre í næstbestu deildini, men var ikki áhugaður í at halda fram har. Lukasz segði seg ætla at royna, um tað bar honum til at spæla í superliguni, og nú royndarvenur hann í Lyngby, sum júst er flutt upp í superliguna. Leygardagin spældi hann við Lyngby í venjingardysti ímóti HB Køge, sum Lyngby tapti 1-0. Næstu dagarnar skal Lukasz Cieslewicz venja í Lyngby, sum so fer at taka støðu til, um talan skal verða um samstarv.

*jonhard@sosialurin.fo*



**ÁRSINS SØRVINGUR**

*Johan Petur á Stongum er virkin í flogbóltinum í SÍ sum bæði spælari og venjari, og fríggjakvøldið fekk hann eitt herðaklapp fyri sín innsats har*

*Savnsmynd: Hilmar Jan Hansen*

# Johan Petur ársins borgari

**FLOGBÓLTUR** Tá Vestanstevnan í Sørvági var sett fríggjakvøldið, varð flogbóltsspælarin og -venjarin, Johan Petur á Stongum, samstundis heiðraður sum »ársins borgari 2010« í Sørvági

**Hilmar Jan Hansen**

At Sørvágur hevur eina serstøðu á Føroya-kortinum, tá vit tosa um flogbólt, er eingin loyna. Hetta mundi eisini vera ein tungtvigandi orsøk til, at júst eitt av undangongufólkunum innan flogbóltin í SÍ, spælarin og venjarin, Johan Petur á Stongum, fríggjakvøldið var heiðraður sum »ársins borgari 2010« í Sørvági.

Hetta fór alt fram, tá Vestanstevnan í Sørvági var sett, og Nancy Selfoss, forkvinna í trivnaðarnevndini hjá Sørvágs kommunu, handaði Johan Peturi heiðursbræv og blómutyssi. Aftaná fortaldi hann Vágaportalinum, at hann ikki helt seg hava uppiborið heiðurin fram um nakran annan:

– Eg taki hetta sum ein sera stóran heiður, at vera valdur »ársins borgari 2010«. Kanska eri eg nú valdur, tí ikki allir í SÍ kunna veljast, segði Johan Petur, ið heldur vildi sæð, at pápi hansara, Jákup á Stongum, fekk heiðurin.

– Men vit eru kortini eitt lið, og eg føli meg ikki at hava gjørt so nógv meira enn hinir sum eg spæli saman við. Eg má so bara góðtaka grundgevingarnar fyri, at eg eri valdur.

Kortini skerst ikki burtur, at Johan Petur á Stongum eigur sín stóra part av æruni fyri, at SÍ vann greipuna hjá bæði kvinnum og monnum. Eftir kappingina varð hann valdur ársins verjuspælari hjá monnum, har hann átti sín týðandi part í bæði føroyameistaraheitinum og steypasigrinum, eins og hann sum venjari hjá kvinnunum átti avgerandi lut í greipuni, kvinnurnar hjá SÍ eisini vunnu.

Johan Petur hevur spælt flogbólt, síðani hann var átta ára gamal, og við árunum hevur hann vunnið 75 heiðursmerki og 10 steyp til ognar sjálvur. Umframt at hava spælt við SÍ, hevur hann eisini spælt við flogbóltslandsliðnum og verið við til at vant kvinnulandsliðið í flogbólti. Og um summarið, tá ikki so nógv virksemi er innan flogbóltin, tekur hann fegin eitt tak á besta mansliðnum hjá 07 Vestur í fótbólti.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# VÍF vildi hava royndan venjara



**VÍF-VENJARI**

*Dia Midjord skal komandi kappingarár venja menninar hjá VÍF*

*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*

**HONDBÓLTUR** Vestmanna Ítróttarfelag hevur gjørt avtalu við Dia Midjord, at hann skal taka sær av vaksnamannaliðunum fyri menn næsta kappingarár

**Áki Bertholdsen**

Í tíðindaskrivið í gjárkvøldið kunngjørdi VÍF, at Dia Midjord, sum er av royndastu venjarum og hevur venjaraútbúgving á hægsta stigi í Europa, hevur gjørt eitt árs sáttmála við VÍF.

– Hetta er ein spennandi uppgáva, sum eg gleði meg til, tí hondbóltur er høgt í metum í Vestmanna, sigur Dia Midjord, sum síðstu trý árini hevur vant mansliðið hjá Kyndli og staðið á odda fyri A-landsliðnum hjá monnum.

Áðrenn tað vandi hann menninar hjá VÍF og var venjari, tá VÍF seinast vann FM-heitið í 2005. Við honum sum venjara spældi liðið seg í eina FM-finalu aftrat, og øll trý árini var VÍF í steypafinaluni, men tað eydnaðist ikki at vinna meira.

Formaðurin í VÍF heldur, at vestmenningar hava fingið rætta mannin at taka sær av liðnum.

– Vit vildu hava fatur á einum royndum venjara, sum kundi geva liðnum nakað. Tað hevur drigið eitt sindur út at fáa spurningin avgreiddan, men vit halda, at tað hevur verið alla bíðitíðina vert, sigur Niels Joensen, formaður í VÍF.

*aki@sosialurin.fo*